| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 29. januar 2009 |
| Býráðsfundur nr. | 01/2009 |
| Borgarstjóri | Sigurð S. Simonsen |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2009 tann 29. januar kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 22. januar 2009 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Jann Toftegaard (møtti kl. 16.40, tá ið mál nr. 2/2009 varð viðgjørt).
Kristina Toftegaard Larsen
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Magnus Midjord
Petur Abrahamsen
Sonnni á Horni

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 01/2009.**

**Val av nevnd í sambandi við bygging nýggjum dagstovni á Kambsdali.**

Fuglafjarðar býráð hevur á fundi tann 23. februar 2006 samtykt eftir tilmæli frá sosialu nevndini tikið avgerð at taka undir við, at nevndin arbeiðir víðari við ætlanin um bygging av nýggjum dagstovi á Kambsdali.

Somuleiðis hevur býráðið tikið avgerð um eftir tilmæli frá sosialu nevndini um at velja eina bygginevnd, hetta vísandi til § 36, stk. 1 og 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri, sum skal verða ráðgevandi yvir fyri føstu nevndunum omanfyri, t.v.s. sosialu nevndini, teknisku nevndini og fíggjarnevndini.

Avgerð varð tikin um at velja niðanfyri standandi í bygginevndina:

- Eyðun á Lakjuni, formann í sosialu nevndini
- Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra
- Pætur Joensen, býarverkfrøðing
- Irenu Olsen, leiðara á sosialu deildini
- Julionnu Næs, dagstovnaleiðara

Vísandi til skipanarfundin hjá nývalda býráðnum tann 29. desember 2008 fyri valskeiðið 2009-2012, so varð val av bygginevndini tíverri ikki á dagskrá og ei heldur tikin við. Tí verður neyðugt at velja bygginevndina av nýggjum, nú farið er inn í nýtt valskeið.

Kommunala fyrisitingin mælir í skrivi, dagfestum 14,. Januar 2009 býráðnum til at velja somu bygginevnd av nýggjum, somuleiðis sum nevndin verður víðkað við Elisabeth D. Eldevig, forkvinnu í sosialu nevndini. Grundgevingin er, at mett verður, at hetta er besta loysn, grundað á at Eyðun á Lakjuni, fyrrverandi formaður í sosialu nevndini hevur verið við í arbeiðinum frá byrjan, og nú er vorðin formaður í teknisku nevndini, sum sjálvsagt eisini er ein partur av málinum, nú byggingin av stovninum av álvara er byrjað.

**Avgerð:**
Tilmælið frá fyrisitingini varð samtykt. (8-0).

**Mál nr. 02/2009.**

**Val av eykalimum í skúlastýrið fyri Fuglafjarðar skúla.**

Nývalda býráðið hevur á skipanarfundinum 29. desember 2008 valt Elisabeth D. Eldevig og Eyðun á Lakjuni sum kommununar umboð í skúlastýri valskeiðið 01. januar 2009 til 31. desember 2012, og hava hesi fingið valbræv frá kommununi, dagfest januar 2009.

Á fundinum vórðu eingir tiltakslimir valdir, hetta grundað á, at í § 50, stk. 2.2. í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan við seinni broyting stendur einki um val av eykalimum, men vísandi til

rundskriv frá mentamálaráðnum um "meginreglur fyri skúlastýri" § 3 verða tiltakslimir innkallaðir, um skúlastýrislimur hevur forfall.

**Avgerð:**
Samtykt varð at velja hesar varalimir í skúlastýrið verandi valskeið:
Fyri Elisabeth D. Eldevig Sonni á Horni
Fyri Eyðun á Lakjuni Petur Abrahamsen

(9-0).

**Mál nr. 03/2009.**

**Val av limi í nevndina viðvíkjani Fuglafjarðar søgu.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Kristini Poulsen, dagfest 12. januar 2009, har hann boðar frá, vísandi til valbræv frá býráðnum, dagfest 08. januar 2009, boðar frá, at tað ikki ber honum til at taka við vali til søgunevndina, somuleiðis sum hann annars rakkar fyri álitið.

**Avgerð:**
Samtykt varð at velja Fritleiv Joensen sum lim í søgunevndini fyri Kristin Poulsen. (9-0).

**Mál nr. 04/2009.**

***Mál viðv. roknskapinum hjá Fuglafjarðar bókasavni fyri 2008***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá P/F Grannskoðaravirkinum INPACT, dagfest 22. januar 2009 saman við grannskoðaðum roknskapi og grannskoðarafrágreiðing fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2008.

Roknskapurin vísir, at samlaðu útreiðslurnar hava verið **kr. 652.252,00** móti mettum kr. 665.736,00. Sostatt eru kr. 13.484,00 meir nýttar enn mett. Lønirnar hava verið kr. 84.000,00 lægri enn mett, hetta kemst av, at bókavørðurin fór úr starvi tann 01.03.2008. Fyrstu tíðina eftir hetta varð ein fyribils avloysari settur. Stutt eftir at starvið varð sett av fyribils bókavørði ynskti hon at verða sett niður í tíð. Soleiðis hevur starvið í størri mun enn vanligt verið røkt av avloysarum.
Húsaútreiðslurnar hava verið kr. 10.500,00 hægri enn mett, bókakeyp og innbinding kr. 44.800,00 hægri enn mett. Aðrar útreiðslur hava verið kr. 15.000,00 hægri enn mett.

Inntøkurnar hava verið kr. 184.000,00 í Landskassastuðli meðan kommunan hevur borðið restina av kostnaðinum, t.e. 466.000,00.

Bókasavnslógin heimilar upp til 40% í stuðli av eini góðkendari rakstrarætlan. Stuðulin verður inntøkuførdur tað árið, hann er játtaður, eftir rakstrarætlanini fyri árið eftir. T.v.s. at rakstrarstuðulin sum er inntøkuførdur í 2008 er grundaður á rakstrarætlanina fyri 2009. Samb. rakstrarætlanina fyri 2009 verður roknað við einum kostnaði upp á kr. 659.888,00 at reka bókasavnið.

Soleiðis skuldi Landskassastuðulin verði kr. 263.955,00, men samb. skriv frá Føroya Landsbókasavni dagf. 16. juli 2008, verða bert kr. 460.000,00 góðkendar sum útgjaldsgrundarlag, sum so gevur kommununi kr. 184.000,00.

Roknskapurin 2008 vísir, at kr. 77.000,00 resta í Landskassastuðli, um talan varð um 40%.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í mentamálanevndini tann 22. januar 2009, og mælir nevndin býráðnum til at góðkenna roknskapin fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2008 uttan viðmerkingar.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá mentamálanevndini og góðkenna roknskapin fyri Fuglafjarðar bókasavn fyri 2008. (9-0).

**Mál nr. 05/2009.**

**Fráboðan frá SEV um aðalfund.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá SEV, dagfest 19. januar 2009 um frábpðan til aðalfundar í SEV tann 06. februar 209 kl. 10.00 á Hotelføroyum, hetta sambært § 3, stk. 7 í viðtøkunum.

***Dagskrá:***
1. Val av fundarstjóra sambært § 3, stk. 4 í viðtøkunum
2. Val av nevnd sambært § 4, stk. 2 og 3 í viðtøkunum
3. Ymiskt

Hjálagt er yvirlit yvir atkvøðutal til aðalfundin, uppgjørt eftir fólkatalinum pr. 30. november 2008, somuleiðis sum send verður fulltrúarváttan, hetta sambært § 3, stk. 3 í viðtøkunum, og skal henda verða send SEV aftur undirskrivað við fráboðan um, hvør hevur fulltrúina kommununar vegna.

**Avgerð:**
Borgarstjórin gav býráðslimunum frágreiðing um fundirnar, sum hildin varð millum tær 6 kommununar í Eysturoynni um val av stýrislmi/varastýrislimi í SEV og nevndarlimi og varanevndarlimi í IRF. Avtala varð gjørd partanna millum um at velja limirnar upp á skift, soleiðis at Sjóvar kommuna skuldi hava stýrislimin í SEV komandi valskeið og Fuglafjarðar varalimin, meðan Eysturkommunan skuldi hava nevndarlimin í IRF og Eiðis kommuna skuldi hava varalimin.

Henda avtala helt tó ikki, grundað á viðurskifti millum Runavíkar-, Nes- og Eiðis kommunur, har avtalað varð, at Eiðis kommuna skuldi fáa limin í nevndina fyri IRF og Eysturkommunan varalimin.

Samtykt varð, at borgarstjórin kemur at hava atkvøðurættin kommununar vegna á aðalfundi og møguligum eykaaðalfundum í Elfelagnum SEV. Tað stendur somuleiðis øllum býráðslimum frítt at møta bæði á aðalfundi og eykaaðalfundum. (9-0).

Býráðið varð samt um at taka undir við, at Kristina Toftegaard Larsen verður uppskot kommununar til stýrislim ella varastýrislim í SEV, um hesin nevndarsessur stendur kommununi í boði, og at Dánjal Vang verður uppskot kommununar til nevndina í IRF, um kommunan fær nevndar- ella varanevndarsess. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 17.30.

Dánjal Vang

Jann Toftegaard

Elisabeth D. Eldevig

Kristina Toftegaard Larsen

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Magnus Midjord

Sonni á Horni

Sigurð S. Simonsen

Skrivari:

Jákup Frants Larsen